**UTTAN ÚR HEIMI**

## Bush-sigur ávirkar rentu og oljuprís

Valsigurin hjá George W. Bush fer helst at hava við sær, at oljuprísurin fer at hækka, og at tað sama fer at henda við rentuni.

Tað heldur í hvussu er búskaparfrøðingurin Peter Kurrild Klitgaard, sum er lektari á Syddansk Universitet. Hann sigur við Ritzau-tíðindastovuna, at Bush hevur lækkað skattin, samstundis sum útreiðslurnar á fíggjarlógini eru øktar nógv, og at tað hevur lagt stórt trýst á dollaran. Tað hevur eisini við sær, at vandi er fyri rentuhækkingum, og hetta fer sjálvandi eisini at ávirka viðurskiftini í Danmark, sigur lektarin.

Peter Kurrild Klitgaard sigur, at sigurin hjá Bush skapar óvissu um, hvat fer at henda í Miðeystri, og tað kann fáa oljuprísin at fara uppaftur longri upp, sigur hann.

## Nader gjørdi ikki mun

Ralph Nader, sum stillaði upp sum óheft valevni á amerikanska forsetavalinum, fekk onga ávirkan á úrslitið.

Nader stillaði eisini upp fyri fýra árum síðani, og tá fekk hann stóra ávirkan á úrslitið. Í Florida fekk hann meiri enn 97.000 atkvøður. Tær flestu vóru frá demokratiskum veljarum, og tí er eingin ivi um, at hann kostaði Al Gore valsigurin. Sum kunnugt vann George W. Bush í Florida og harvið valið, tí hann fekk 537 atkvøður fleiri enn Gore.

Men hesaferð fekk Ralph Nader bara 32.000 atkvøður í Florida, og tað gjørdi hvørki til ella frá, tí munurin ímillum Bush og John Kerry var størri enn so. Sambært valmyndugleikunum fekk Ralph Nader knappliga 400.000 atkvøður um alt landið, og tað svarar til eitt prosent.

## Úr Irak

Ungarska stjórnin hevur gjørt av at taka teir 300 ungarsku hermenninar úr Irak, sigur Ferenc Gyurcsany, forsætisráðharri.

Hann sigur, at Ungarn hevur játtað at lata hermenninar verða verandi í Irak, til irakar hava valt nýtt tjóðarting. Tað verður ætlandi í januar, og tí roknar hann við, at hermenninir verða tiknir haðani í mars. Orsøkina til afturtøkuna sigur hann vera, at Ungarn hevur avmarkaðar fíggjarligar møguleikar, og harafturat er ungarska fólkið ímóti, at landið hevur hermenn í Irak.

Ungarn er ikki tað einasta ES-landið sum fer at taka sínar hermenn úr Irak. Polska stjórnin hevur fyrr sagt, at hon fer at taka ein part av teimum 2.500 polsku hermonnunum úr Irak næsta ár.

## Stuðul til Saab

Amerikanska bilaverksmiðjan General Motors kunngjørdi herfyri, at hon umhugsar at steingja Saab-verksmiðjuna í Trollhættan. Orsøkin er, at GM ætlar at miðsavna framleiðsluna á einari evropeiskari verksmiðju, og valið stendur ímillum Saab í Svøríki og Opel í Týsklandi.

Tað fær álvarssamar avleiðingar fyri Trollhættan-økið, verður verksmiðjan stongd, og tí hevur svenska stjórnin gjørt av at gera sítt til, at tað ikki hendir. Fyrramorgunin kunngjørdi stjórnin, at hon hevur gjørt av at játta 2,4 milliardir svenskar krónur til at bøta um vega- og jarnbreytarkervið á Trollhættan-leiðini. Ætlanin er millum annað at gera ein nýggjan motorveg og eina nýggja jarnbreyt ímillum Trollhættan og Gøteborg. Harafturat ætlar stjórnin at økja játtanina til gransking.

Umleið 150.000 fólk arbeiða í svenska bilídnaðinum. Verksmiðjan hjá Saab í Trollhættan gjørdi 114.000 bilar í fjør.



*Bush-familjan var í góðum hýri, tá valsigurin var staðfestur, men serfrøðingar vænta ikki, at viðurskiftini millum USA og Evropa fara at batna, nú Bush er afturvaldur*

# Kaldari millum USA og Evropa

**Valsigurin hjá Bush fer ikki at gagna viðurskiftunum millum USA og Evropa, halda serfrøðingar. Iran kann gerast tann størsti trupulleikin**

VAL Í USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fleiri serfrøðingar vænta, at valsigurin hjá George W. Bush kemur viðurskiftunum millum Evropa og USA illa við, og teir rokna við, at ósemjurnar verða fleiri tey næstu fýra árini.

Daniel Gros, sum starvast á Centre for European Policy Studies, sigur við Reuter, at Iran kann gerast høvuðstrupulleikin.

– Amerikanararnir halda, at teir hava prógv fyri, at Iran er í ferð við at útvega sær kjarnorkuvápn, og teir eru tí sinnaðir at fara til verka fyri at forða tí. Hinvegin roynir Evropa at fáa iranar at sleppa ætlanini við at bjóða teimum ymiskt afturfyri. Hetta líkist onkrum, sum vit hava sæð fyrr, sigur Daniel Gros.

James Cameron, sum starvast á ES-stovninum European Policy Centre, stúrir eisini fyri viðurskiftunum tvørtur um Atlantshavið tey næstu árini. Hann heldur, at Bush fer at meta sín valsigur sum eina váttan um, at amerikanska fólkið tekur undir við tí uttanríkispolitikki, sum forsetin hevur rikið higartil.

– Einki bendir á, at Bush fer at broyta sín uttanríkispolitikk, og at hann fer at virka fyri størri altjóða samstarvi. Hann fer at halda somu kós sum higartil í bardaganum ímóti yvirgangi, sigur James Camron. Hann væntar kortini, at Bush fer at nýta eitt annað orðalag, tá tað snýr seg um Frakland og Týskland, men at tað bert fer at snúgva seg um sjálvt orðalagið.

Alment hevur ES ynskt George W. Bush tillukku við afturvalinum, men fráfarandi formaðurin í ES-nevndini, Romano Prodi, hevur samstundis heitt á amerikanska forsetan um at vísa størri virðing fyri altjóða samfelagnum.

– Evropa fer framvegis at royna at styrkja bondini tvørtur um Atlantshavið, tí júst hesi bondini eru avgerandi fyri, at vit kunnu varðveita friðin, sigur Prodi. Tað sama sigur franski uttanríkisráðharrin, Michel Barnier.

– Amerikanararnir mugu ikki halda, at teir einsamallir kunnu byggja heimin, stýra heiminum og hava eftirlit við heiminum, sigur hann.

# Prógv ímóti Saddam farin fyri skeyti

**Nógv prógvtilfar ímóti fyrrverandi irakska einaræðisharranum er farið fyri skeyti, sigur mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Human Rights Watch skrivar í einari drúgvari frágreiðing, at útlendsku herdeildirnar gjørdu alt ov lítið fyri at tryggja sær týðandi skjøl, sum vóru í ymsum skjalagoymslum hjá einaræðisstýrinum hjá Saddam Hussein. Harafturat verður víst á, at illir irakar gjørdu seg inn á fleiri hópgravir, uttan at teir útlendsku hermenninir royndu at forða tí.

– Úrslitið er, at vit hava mist týðandi upplýsingar, sigur Sarah Leah Wilson hjá Human Rights Watch við tíðindastovuna AP. Hon væntar, at hetta kann fáa álvarssamar avleiðingar fyri tað komandi rættarmálið ímóti Saddam Hussein og næstu medarbeiðarum hansara.

Saddam Hussein er ákærdur fyri at hava givið herinum boð um at myrða fleiri túsund shiamuslimar og kurdar, tí teir gjørdu uppreistur ímóti stýri hansara undir Flógvakrígnum í 1991. Hann er eisini ákærdur fyri at hava beint fyri fleiri politiskum mótstøðumonnum, fyri at hava nýtt eiturgass ímóti kurdunum í býnum Halabja í 1998 og fyri at hava gjørt innrás í Kuwait í 1990. Ellivu av hansara heryvirmonnum eru eisini ákærdir.

Human Rights Watch sigur, at tað er umráðandi at tryggja tey prógv, sum eru eftir, og sum kunnu nýtast ímóti Saddam Hussein og monnum hansara.

– Øll prógv hava týdning fyri rættarmálið, og tað er umráðandi, at irakar fá eitt fullfíggjað yvirlit yvir brotsverkini hjá einaræðisstýrinum, sigur Sarah Leah Wilson.



# Hús brunnu í Vági





**Á middegi mikudagin sást roykur koma úr eini húsatekju í Vági. Alt brann innan úr húsunum**

ELDUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Á middegi mikudagin sást roykur koma úr eini húsatekju í Vági. Klokkan var júst 12, tá eldur eisini sást koma upp gjøgnum tekjuna. Fáar minuttir seinni var sløkkilið á staðnum og sera nógvur og tjúkkur roykur sást, meðan sløkkiarbeiðið fór fram.

Alt brann innan úr húsunum. Eitt eldri par búði í húsunum, men tey sluppu bæði út í øllum góðum. Tað sigst, at orsøkin til eldsbrunan var ein grýta við feitti, ið stóð komfýrinum.Vandi var ongantíð fyri grannahúsunum, hóast fleiri hús eru rundanum húsini, ið brunnu.

## Tað almenna skal stuðla breiðbandi

KT-felagið heldur, at breiðband internetsamband er avgerandi fyri menningina á KT-økinum, og tí mugu føroyingar gera nakað serligt fyri at fylgja við øðrum londum.

– Flestu nýskapandi KT-loysnirnar í dag verða mentar í sambandi við, at fólk um allan heim fáa breiðband (skjótt internet) heima og til arbeiðis. Her klára Føroyar ikki at fylgja við, sigur KT-felagið.

– Bara nøkur fá prosent av føroyingum hava breiðband, og ein høvuðsorsøk er, at uttanlands-sambandið er lutfalsliga dýrt, og at fólk skulu gjalda eftir nýtslu. Neyðugt er at fáa prísirnar niður og fáa grundarlag fyri sonevndari flat-rate avrokning (sama gjald líkamikið nýtslu).

KT-felagið heldur, at hetta kundi til dømis verið gjørt við, at tað almenna í eitt avmarkað tíðarskeið setti pening av til útbreiðslu av breiðbandi í Føroyum.

**ek**

## Bað um hjálp frá norðurlondunum

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður við mentamálum, heitti í eini røðu á Norðurlandaráðsfundi í Stockholm á hini norðurlondini um virka fyri, at føroyingar kunnu síggja sendingar úr almennu sjónvarpsrásunum í hinum norðurlondunum.

Jógvan á Lakuni greiddi frá støðuni hjá føroyska sjónvarpinum, nú onnur eru farin at bjóða DR til sínar hyggjarar.

– Føroyska sjónvarp má tí finna fótafestið aftur, og vit umhugsa møguleikan at senda public service-tilfar hjá øðrum norðurlendskum rásum í føroyskum sjónvarpi, segði Jógvan á Lakjuni.

– Hetta kundi verið gjørt í norðurlendska andanum og tænt samstarvinum stóran heiður, segði landsstýrismað-urin.

**ek**

e johan mortensen



e vitan
e vinnulív
e vælferð
TJÓÐVELDISFLOKKURIN

## Hugnakvøld, eydnuhjól og tombola

**Fríggjakvøldið og leygarkvøldið sleppa valevnir til bygdaráðið í Nes kommunu at snara eydnuhjólinum í Svangaskarði**

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Komandi vikuskiftið, 5.-6. november, skipar Tofta Ítróttarfelag fyri eydnuhjóli og tombola á Svangaskarði.

Felagið sigur, at nógvir og góðir vinningar verða at vinna, eitt nú ræst føroyskt kjøt.

Tiltakið byrjar fríggjakvøldið klokkan 20 og heldur fram leygarkvøldið klokkan 19.

Bæði kvøldini luttaka valevnir í Nes kommunu, nú kommunuval stundar til. Á Svangaskarði sleppa tey, sum bjóða seg fram til valið, at snara eydnuhjólinum og samstundis fáa tey høvi at greiða frá sínum ætlanum.